

*Frammi í gron á Vestland. Johan eru høgrumegin*



*»Reyði« var ein óførur fiskimaður. Her kemur posin aftur umborð fullur av fiski*



*Hetta er Yukon, ein av teimum grønu donsku bátunum. Sum tað sæst, er hann merktur LO, sum stendur fyri London*

allari útgerð. Vit fingu boð um at koma uppá dekkið og fingu bajonettir settar móti bringuni. Tá byrjaðu vit at síggja, at tað var kríggj. Hetta høvdu vit ikki sæð so nógv til frammanundan.

Bretarnir vildu sjálvsagt síggja øll pappír hjá skipinum. Vit søgdu sum var, at vit vóru eitt fiskiskip á veg úr Íslandi til markna. So komu teir umborð við jarnstongum, sum teir steytaðu niður í lastina at vita, um nakað illgrunasamt var at finna. Teir lýstu eftir nummarinum, og sóu, at tað stóð LO, fyri London, á bógnum. Eisini flaggaðu vit við einum bretskum vimpli á afturmastrini.

Skiparin fekk at vita, at hann skuldu lystra ordrar eina aðru ferð. Tað skuldi eingin spurningur vera um tað.

## Skip søkt av minum

Vit sluppu so leysir og hildu á at sigla. Tá ið vit tá komu niðan eftir Humberánni, sóu vit fleiri jarnskip, sum vóru søkt. Hetta var fyrstu ferð, at týskarar nýttu tær magnetisku minurnar. Tær vóru blakaðar á sjógv av flogførum, og »lupu á« tað, sum var av jarni. Minurnar vóru ikki størri enn fótbóltar. Eina ferð, eg seinni við Normanner, hevði útkikk taldi eg 17 ella 18 av hesum minunum.

Men hesar minur gjørdu so ikki træskipum nakað. Men tað var nokk so skjótt, at bretar funnu útav at leggja ein antimagnetiskan kápul um jarnskipini, so hesin vandin kundi fyribyrgjast.

Tað vóru tískil tvey sløg av minum. Týskarar nýttu hesar minurnar, sum »bert« sprongdu hol á skipið.

Bretar løgdu eitt annað slag av minum, sum vóru nógv størri. Tær vóru ankraðar í minubeltum, sum skipini skuldu halda seg uttanfyri. Rendu tey kortini á eina slíka minu, kundi hon sprongja skipið í luftina, og tá var ofta ikki bøn hjá manningini. Tað vóru hesar minur, sum kostaðu føroyingum fleiri skip og mannalív.

## Veddaðu um salgið

Eg minnist, at vit plagdu at vedda um, hvussu nógv vit fóru at fáa fyri lastina. Vestland hevði gjørt ein so sera góðan túr árið frammanundan. Tá hevði hann selt fyri 1.400 pund, og var hetta sera nógv. Sjálvur var eg ikki vanur við slík tøl. Vit vóru vanir at selja fyri eini 200 pund, tá ið eg sigldi við Hjalmar, og tá var tað gott. Onkur skjeyt uppá 1.500 pund, onkur annar tordi at fara uppá 2.000 pund. So segði onkur triði, at vit munnu fara at selja fyri 2.500 pund. Tá svór og bannaði skiparin við, at hetta fór so ikki at henda. Úrslitið gjørdist, at vit seldu fyri 2.600 pund, og hetta var ein øgiligur túrur. Hetta var eins nógv, sum nógv størri føroysk skip plagdu at selja fyri fyrst undir krígnum.

Eg fekk kr. 500 bert fyri hendan túrin, sum vardi einar 3 vikur. Til sammetingar hevði eg forvunnið 900 kr. alt árið 1939 við Thurid.

## Bumbaðir í átta av 10 døgum

Vit koma so inn til Grimsby og liggja her í 10 dagar. Menninir vistu ikki, um teir skuldu fara avstað aftur. Hetta var fyrsti túrur, síðan hersetingina av Danmark. Teir høvdu einki samband heim til Danmarkar. Ei heldur høvdu teir nakað heim at vera í, og máttu búgva umborð. Alt var so óvist hjá teimum.

Vit fingu so boð frá umboðsmanninum, at vit skuldu vera umborð tann 10. dagin eina ávísa klokkutíð. Tá høvdu teir orðnað at taka ís og útgerð.

Av hesum 10 døgum vit vóru inni, bumbaðu týskarar í átta dagar. 30 fólk vórðu dripin og 160 vóru særd. Teir bumbaðu eisini í Hull nærindis, og har varð munandi meira bumbað og fleiri fólk doyðu. Millum annað varð danska sjómanskirkjan í Hull bumbað, soleiðis sum vit greiddu frá í fjør í samrøðu við Harry Wilson, giftur við føroysku Honnu Apol.

Grimsby hevði verið bumbaður frammanundan eisini. Hetta sóu vit, tá ið vit fóru í land, og vit gingu framvið toftunum av bumbaðum bygningum. Grimsby var ikki nakar vakur býur tá.

Eg minnist serliga eitt bumbuálop hesar dagarnar. Eg stóð í kappanum. Alt var myrkt. Mann slapp ikki í land. Meðan eg stóð í kappanum var eitt øgiligt brøl. Eg minnist, at eg hekk í leysari luft í kappanum, tá tað brast. Eg mátti bara halda fast, tí beinini fóru undan mær, so stórt var lufttrýstið.

Hetta var ein bumba, sum var slept ikki so langt frá okkum. Tað var eitt grúligt sorl men ikki nógvur mannaskaði, sum vit frættu um. Nógvur skaði var hendur uttarlaga í dokkini.

Soleiðis var, sum eg upplivdi kríggið frá byrjan av.

## Til Havnar at keypa breyð

So fara vit avstað aftur, og tá fáa allir teir donsku bátarnir tey boð, at teir skuldu framyvir til Fleetwood á vesturstrond Bretlands at landa. Hetta var mett at vera minni vandafult, tí Fleetvood lá tað longri burtur frá vandaøki. Framvegis vildu bretar fegnir hava fiskin, sum saman við føroysku landingunum høvdu stóran týdning fyri matvøruforsýningina í Bretlandi undir krígnum.

Vit fóru so avstað aftur. Vit løgdu altíð inn á Havnina, tá leiðin gekk framvið til Íslands. Í Onglandi fekst bert luff, eitt slag av franskbreyði, men danir vildu hava ordiligt rugbreyði, sum tað fekst í Føroyum.

Tað kann skoyast uppí, at »tjóðarrætturin« hjá teimum var vanlig donsku speygupylsa.

So eg slapp tá heim nakrar tímar. Hetta hevði tó tann vansa, at eg fekk sjóverk, tá ið vit fóru avstað aftur.

### Rættingar

Í fyrsta part varð undir yvirskrivtini »Ósjónlig mørk« varð greittt frá monnum, sum stóðu eystanfyri og vestanfyri í býnum og prátaðu. Her var býtt um uppá eystur og vestur.

Í seinasta parti varð sagt, at Matthias Jacobsen var skipari á Elsu. Tað var beiggi hansara Hans.

**Næstu ferð**

Í komandi parti greiðir Johan framhaldandi frá síni sigling undir krígnum. Hann er eisini við til jarðarferðina hjá fyrrverandi bretska forsætisráðharranum Neville Chaimberlain